gult cyan magenta svart



VIÐMERKINGAR

# Er Gud fullveldismaður?



Sonni Jacobsen

Í seinastuni er pástandurin, at Gud skal vera »fullveldismaður«, komin fram nakrar ferð. Tey flestu av okkum antin smílast ella irriterast helst um pástandin og hugsa, um vit skulu taka hetta sum skemt ella um pástandurin er hugsaður sum álvara?

Um nú onkur gav okkum henda spurning í álvara, hvat kundu vit so svara? Hetta havi eg hugsa eitt sindur um. Tað fyrsta, mær rennur til hugs er, at vit lesa í bíbliuni, at Gud er bæði rættvísur og ópartískur »Gud ger ikki mannamun«, sigur ápostulin. Ígjøgnum ein av gomlu profetunum sigur Gud eisini, at Hansara, altso Guds hugsanir, eru ikki okkara hugsanir. Sum himinin er yvir jørðini, eru Guds hugsanir hægri enn okkara. Tað vil við øðrum orðum siga, at Gud hevur ikki somu hugsanir um ting sum vit hava. Og hvussu kundi hann tað? Fyri tað fyrsta er Gud ikki bundin at umstøðum og tíð, eins og vit eru tað, Hann er, sum profeturin sigur tað, omanfyri alt okkara. Eisini kennir hann sannleikan um fólk, landastýri og søgu, fyri at nevna okkurt, sum vit t.d. mangan ikki gera. Tí eru hansara hugsanir ikki okkara hugsanir. Hann hevur eisini onnur motiv fyri sínum hugsanum enn vit. Hann er ikki bundin av t.d. stoltleika ella materiellum tingum, eins og vit eru tað.

Eg vil pástanda, at vit altíð mugu vera sera varin, áðrenn vit binda Gudi ætlanir og motiv upp á ermuna. Frammanfyri nevndu grundirnar eru millum grundgevingar mínar, umframt aðrar grundgevingar, sum eg skal koma til.

Taka vit spurningin í álvara, skulu vit minnast til, at Gud er líka væl Gud fyri sambandsmonnum sum fyri loysingarmonnum. Gud hoyrir og lurtar eftir bønum frá báðum pørtum. Gud elskar ikki annan partin hægri enn hin og Hann svarar ikki øðrum partinum betri enn hinum. Gjørdi Hann tað, var Hann væl ikki rættvísur? Tá hugsi eg sjálvsagt ikki um ógudiligar politiskar skipanir, sum Gudi væl má standast við. Og tó, Gud elskar øll menniskju líka høgt, óansæð politiskan lit. Hann hevur skapt øll og tað er Hann, sum hevur givið øllum vit at hugsa og resonerað við. Summi brúka vitið at resonera seg til at vera loysingarsinnaður, summi brúka vitið at resonara seg til at vera sambandssinnaður. Báðir partar brúka vit og skil, sum Gud hevur givið teimum, og tó koma teir til heilt mótsætta niðurstøðu. Niðurstøðan er komin av umstøðunum og av lyndinum, sum aftur Gud hevur lagt í tann einstaka. Harvið er kortini ikki sagt, at allar hugsanir eru rættar og at Gud tekur undir við øllum. Frá bíbliuni vita vit, at Gud t.d. ikki tekur undir við nøkrum, sum er ímóti Hansara skrivaða orði, bíbliuni og tí kristnu læruni annars. Sum Gud sjálvur er høvundi at gjøgnum heilaga andan, talsmannin.

Um vit venda aftur til løgna pástandin. Kunnu vit siga, at Gud ikki vil, at føroyingar skulu vera saman við dønum? Hví skuldi Gud havt nakað ímóti dønum? Ella eru vit føroyingar so nógv betri enn danir? Er Gud ikki líka nógv Gud hjá dønum sum hjá føroyingum? Sjálvandi! Kanska er tað av kærleika, at Gud hevur latið okkum verið undir danaveldi? Vóru vit ikki undir danaveldi, er rættuliga vist, at vit vóru undir bretskum veldi, og teir hava ikki verið so fittir við sínar undirsáttar, sum danir hóast alt hava verið.

Nú sigi eg ikki, at vit skulu vera saman við dønum fyri hetta. Eg hugsi bara um áðurnevnda spurning.

Besta svari hvat Gud hugsar finna vit í bíbliuni. Gud læt seg føða inn í henda heim við menniskjanum Jesusi Kristi frá Nazareth. Gjøgnum Jesus síggja vit Guds lyndi og hugsunarhátt. Áhugavert er at leggja til merkis, at júst á teimum døgum, tá Gud gekk her á fold í kjøti og blóði í landinum Ísrael ella Palestina, var hetta land hersett. Tann hersetingin var nógvar ferðir meira karráð og hørð, enn vit her í Føroyum nakrantíð hava merkt frá danskari hond. Enn ikki í 1500 ella 1600 árunum. Danir hava t.d. ongantíð krossfest føroyingar, sjálvt um teir lótu nakrar hálshøgga, onkrar drukna og onkrar heingja. Men tað vóru vanliga brotsmenn, sum lógu slíka lagnu, og danir góðvu sínum egnu landsmonnum somu straff fyri somu gerð. Teir gjørdu soleiðis ikki missmun.

Vit lesa ongantíð, at Jesus blandaði seg upp í kjakið, hvørt Ísrael skuldi vera frítt frá rómverjum ella ikki. Hann mótmælti enn ikki, at teir skuldu gjalda skatt til rómverjar, sum vit lesa. Reint menniskjaliga tala, var nógv størri grund til at halda, at ísraelar skuldu vera fríðir frá rómverska jarnhælinum enn føroyingar frá dana floyðalshond, sum tað samanberandi kundi verið nevnt. Hugsa vit um munin, so var teirra trupulleiki veruligur, okkara trupulleiki er bert ein luksustrupulleiki aftur ímóti, tí vit hava jú í veruleikanum sjálvstýri og kunnu avgera flest øll mál sjálvi. Tað er væl saktans bert okkara stoltleiki og forfeingiligheit, sum vil hava, at vit skulu hava meir? Forkelaði og spilt er kanska rætta orðið? Hjá okkum er yvirvald dana ikki ein høttan ella kúðan, heldur er tað eitt trygdarnet. Danir taka ikki frá okkum, teir geva o.s.fr. Vóru danir veruliga harðir og karráðir, sum onkur vil vera við so ivist eg ikki í, at sjálvt Edmund Joensen hevði verið tjóðveldismaður! Men veruleikin er ein annar. Tíverri fyri onkran? Tí sigi eg: Hví skuldi Gud gramt seg um okkara støðu? Tað eru mong fólkasløg í heiminum sum verluliga hava tað ringt. Persónliga rokni eg við, at Guds kærleiksfulla hjarta gremur seg meira um hesi. Um hirðan stendur tað, at hann fór fyrst og fremst út at bjarga teimum, sum vóru í neyð. Teimum vælbjargaðu hevði hann ikki fyri neyðini at hugsa um her og nú. Tey høvdu tað jú gott. Sjálvur haldi eg, at vit passa betri til tey seinast nevndu.

Sum eg byrjaði at siga, so er hetta ikki hugsa sum ein støðutakan fyri ella ímóti føroyskum fullveldi. Eg vil eisini siga, at tað í sær sjálvum er positivt, at fólk hugsa um Gud í øllum hesum meldrinum. Men læt okkum hugsa um Gud og brúka Guds navn á rættan hátt, og ikki draga Gud niður og misbrúki ikki Guds navn sum jarnbrot í politiskum ella øðrum versligum ætlanum. Vit kunnu taka fullveldi, um tað er tað fólkið vil. Men misbrúka vit Guds navn í jagstranini at fáa henda viljan í fólkið, tá er ætlanin dálka við synd. Og tað er eingin góð byrjan, tá: »en nation fødes«.

# Hví ikki avtaka ferðaseðlaprísir hjá SL um sundini?

Marjus Dam

Tað kostar nevniliga onki at avtaka, tí gjaldast skal bert á annan hátt!

Er tíðin ikki komin at viðurkenna, at Landsvegir eisini eru um firðir og sund okkara?

• Ídag er galdandi, at landskassin heldur landsvegir okkara. Hesir landsvegir eru ídag bert vegir á landi. Tað eru vit øll felags um at gjalda.

• Tá talan er um sigling ímillum oyggjarnar, so verður annar hugsunarháttur galdandi. Nú skal gjaldast fyri at ferðast. Serliga er tað útjaðarin, ið fær hesa rokning. Hendan útjaðaraøkisrokningin er ferðaseðlainntøka hjá SL. Hesin útjaðaraøkisskatturin var 40 milliónir krónur seinasta ár.

• Tá útjaðarin í flestu støðum hevur trupul kor, er tað so rætt at geva fólki og vinnu eyka rokning uppá hesar 40 milliónir krónurnar árliga afturat? Er tað rættvíst kann ein spyrja?. Kann gerast á annan hátt?

• Ja, tað ber væl til!

• Um hesin útjaðaraøkisskatturin varð heilt avtikin og játtanin til SL tilsvarandi økt, so hevði kostnaðurin fyri hvønn einstakan lønmóttakara verið 128 krónur um mánaðin (um vit eru 26000 lønmóttakarar). Tá er vinnan ikki rokna við. Og ferðslan um sundini hevði verið sett javnt við ferðsluna uppi á landi. Ikki ein stór upphædd, munnu flest øll vera samd um. Og hesar 40 milliónir krónurnar, sum útjaðarin ídag nærum einsamallur skal gjalda, hevði bert verið goldin á annan hátt – av øllum. Og tí onki kosta meira.

• Tað hevði verið útjaðaraøkispolitikkur so tað stóð eftir.

Tað áttu vit at gjørt nakað við – skjótast gjørligt.

• Vit høvdu tá meira viðurkent, at vit vóru oyggjasamfelag, har øll høvdu somu rættindir

• Ferðandi og vinna sluppu undan tí kappingaravlagan, tað er at gjalda 40 milliónir krónur eyka,

• Eina upphædd, ið øll áttu at lyft í felag!



Tíðindaskriv:

## Vinnumenning

Sandoyar Sýslu Vinnuráð (SSV) skipar fyri vinnufundi Mánadagin hin 12 mars kl. 19.30 á virkinum hjá Sandoy Seafood í Skopun.

Ólavur Gregersen stjóri á TK-stovuni hevur framløgu undir heitinum.

»Vinnumenning á Sandoynni – eisini ábyrgdin hjá tí einstaka«

*Skráin fyri fundin verður annars henda:*

1. Um TK Stovuna
2. Vinnurák framyvir við atliti til framleiðslu, fígging, samstarv, leiðslu og marknað
3. Vinnumenning á Sandoynni - møguleikar sæð uttanífrá
4. Hvat halda sandoyingar – sjónarmið og kjak
5. Samandráttur

Tíðindaskriv

## Grækarismessuhald í Havn

Sunnudagin 11. mars kl. 15.00 verður Grækarismessuhald á Vaglinum.

Skótarnir ganga skrúðgongu, og Havnar hornorkestur spælir.

Vár í Ólavstovu flytur fram røðu.

Allir skótar í Havnini skulu møta ein tíma áðrenn í skótahølum sínum.

Skrúðgongan ferð frá Vágsbotni kl.14.45.

Gingið verður eftir Bøgøtu-Tróndargøtu-Niels Finsensgøta-oman á Vaglið.

# hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 9. mars til hósdagin 15. mars

## Vágin Tilvera




*Sunnudagin sendir TV3 filmin, Maximum Risk, sum snýr seg um ein løgreglumann, sum setir lív sítt í alstóran vanda. Fyri at finna út av hvør hevur dripið tvíburðabróður sín, ger Alain Moreau av, at hann skal átaka sær leiklutin sum deyði beiggin. Við hesum setir hann lív sítt í álvarsligan vanda, tí teir, sum hildu seg hava dripið beiggjan, eru sjálvsagt ikki áhugaðir í, at hann kortini skal vera livandi.*

## Munn- og kleyvasótt og fullveldi.

*Marna Jakobsen ummælir:*



Vikan, ið farin er, hevur havt tvey høvuðstíðindi: munn- og kleyvasótt og fullveldi.

Útvarpið tosaði við landsdjóralæknan og tað ljóðaði á honum, sum størsta høvuðbrýggj hansara var, um tað fór at gerast møguligt at grava nóg stór hol at tyrva dripin dýr í. Tað var ikki sørt, at tað hoyrdist á útvarpsmanninum, at hann var skelkaður av svarinum. Tað sum tó var meira áhugavert var, at hann segði tað ikki vera møguligt at staðfesta um munn- og kleyvasótt var í Føroyum, tí at vit ikki høvdu amboðini til hetta, og at tað var ógjørligt at senda tilfar niður til kanningar, tí at tað ikki helt sær allan vegin. Tá ið hugsað verður um nýggju fiskivinnuavtaluni við ES, tyktist hetta mær meira skelkandi at hoyra enn um trupulleikin at grava nóg stór hol.

Fullveldismálið hevur hesa vikuna mint um eitt illa skrivað drama. Fjølmiðlafólk hava tugt og tanlað hetta mál uttan at vit í roynd og veru hava fingið nakað at vita. Vit hava hoyrt nærum í hvørjari tíðindasending at onki var at frætta. Vit hava, saman við fjølmiðlunum, bíðað eftir at løgmaður skuldi koma aftur úr London. Leygardagurin kom, og vit nærkaðust alsamt meira og meira hæddarpunktinum, við hvørt kendist tað sum borgarakríggj kundi brostið á hvørja løtu. Fjølmiðlarnir vóru tó ógvuliga varnir og ansaðu væl eftir at vit ikki hoyrdu og sóu ov nógv til mótmælisfundin á Vaglinum. Sjónvarpið hevði eitt lítið innslag, tó var mesti parturin tikin so passaliga langt burturfrá at tú hvørki hoyrdi ella sá.

Havi latið mær fortalt at Rás 2 sendi frá mótmælisfundinum, tað skulu tey hava rós fyri, bert spell at rásin ikki hoyrist her suðuri.

Hví hava vit útvarp? Er útvarpið bara til smá tíðindi og undirhald? Eg haldi, at loftmiðlarnir áttu at lagt sær í geyma, hvussu Føroyar landafrøðiliga síggja út. Tað ber ikki til hjá t.d. suðringum at koma til Havnar til ein fyrilestur, sum er kl. 8 um kvøldið, tí tey skulu til arbeiðis morgunin eftir. Tí haldi eg, at tað ikki hevði verið órímuligt um útvarp og sjónvarp átóku sær eina upplýsandi funktión sum var fyri allar føroyingar.

Hæddarpunktið, ið vera skuldi í fullveldismálinum, gjørdist til eina brostna ballón. Høgni varð sagdur at vera tungur í huga, møguliga var løgmaður eisini tungur í huga, tí at hann ikki slapp at gera samgongu við Javnaðarflokkin. Tað er týðiligt at alt fleiri fólkafloksfólk royna at sleppa sær framat mikrofonunum fyri at siga sína meining um fullveldisgongdina, um tað er tí at tey vænta nývál er ilt at siga, men agitatión er hetta.

Sjónvarpið hevði sama kvøld samsending við DR 2 um Føroyar. Her var henda so tiltikna veljarakanningin aftur havd á munni sum Útvarpið kunngjørdi fyrst í februar. Hendan veljarakanning tykist at hava havt alstóran tydning fyri gongdina í fullveldismálinum, enn eitt dømi um tað vald fjølmiðlar hava. Eitt av úrslitunum í kanningini, er úrslitið úr Sandoynni, har hevur veljarin gjørt eina kúvending, tí bert 27,3 % siga seg atkvøða ja á fólkaatkvøðuni, ið skuldi vera 26 mei. Hetta tykist mær løgið, og enn løgnari at ongin, mær vitandi, hevur nevnt hetta.

Nú kundi kanska onkur sagt, at Sandoyggin ikki hevur nakran týdning í hesum samanhangi, men tá hugsað verður um hvussu fáar atkvøður tryggjaðu forsetanum í USA valdið, so kanska Sandoyggin eisini hevði gjørt mun.

Eg havi tó lurtað eftir øðrum enn tíðindum. Sendingina hjá Jógvani Arge "Spyr bara" dámar mær væl, eg haldi hon man vera ein tann áhugaverdasta í útvarpinum. Fólkini, ið tosa saman, hóska stak væl saman, har er nógv bæði seriøst, men eisini stuttligt.

"Okkara kokkar" skulu fáa mítt besta viðmæli hesa ferð. Sendingin minti í byrjanini um matsendingarnar hjá enska kokkinum Floyd. Ok, hasin maturin uttan fyri summarhúsið hjá Gudmundi kundi kanska verið leskiligari, men tá ið man er útflukt galda aðrir reglar. Vitjanin á matstaðnum har Mourentsa Poulsen er kokkur og á norðurlendska mentunarhúsinum vóru sera væleydnaðar.

So nærkast vit enn einaferð 8. mars. Tað hoyrdist týsmorgunin og aftur á døgurða, tá ið vit fingu at vita tey sera týdningarmiklu tíðindini, at ráðgevin hjá svenska javnstøðuráðmálakvinnuni, hevði spýð á hana í einum flúgvara, tað var so hansara kommentarur til hennara.

Týskvøldið kom so árliga sendingin um kvinnumál í útvarpinum. Tað er soleiðis, at ávísir dagar vera serliga hátíðarhildnir í loftmiðlunum. T.d. árligi Aids dagurin og Altjóða kvinnudagurin. Sendingin í ár kom í "Føroyum í dag", hon snúði seg serliga um, hví kvinnur vóru so lítið umboðaðar á tingi og í bygdaráðum. Bjørt Samuelsen stílaði fyri og illa var fyristílað. Eg hugsaði óndar tankar um kvinnur og teknikk. Eg hoyrdi einki fyri koppaskrambli og fólkatosi rundanum! So um onkur dugir kunstin at fáa hatta óljóðið burtur, so vit hoyra hvat tær siga, so endursendi hana, tí viðhvørt helt eg meg hoyra okkurt skilagott.

## Højt spil




## Basalt




## Skadestuen

